

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 02 - 2012

# Arktis kann sameina Noreg og Kina

Noreg vónar, at eitt samstarv um arktiska økið kann steðga kinesisku revsitiltøkunum mótvegis landinum. Tað fekk øði í kinverjar, at friðarheiðursløn Nobels í 2010 varð latin Liu Xiabo, sum hevur funnist at kinesiska stýrinum. Síðani hevur Kina kvett alt samband við norsku stjørnina og norska vinnulívið. Men nú røkist fyri, at Kina má sættast við Noreg aftur. Hetta tí, at møguleikarnir at samstarva um arktiska økið eru so mikið áhugaverdir fyri Kina, at stóra ríkið hevur biðið um at gerast partur av arktiska ráðnum sum eygleiðaraland. Hetta samstarvið er umráðandi fyri Kina, tí ísurin, sum bráðnar í arktiska økinum, skapar nýggjar møguleikar, tá tað kemur til eitt nú skjótari flutning millum Asia og Evropa, umframt at roknast kann við nýggjum møguleikum við ráevnisvinnu. Tað verður í summar, at tey átta limalondini í arktiska ráðnum skulu viðgera umsóknirnar frá Kina og øðrum londum. Endaliga avgerðin um hetta skal takast í næsta ár. Men støðan hjá Kina mótvegis Noreg ger ikki teirra møguleikar lættari. Jonas Gahr Støre, norski uttanríkisráðharrin, segði á vitjan síni í Keypmannahavn fyrst í februar, at hann bæði vónar og væntar, at stríðið millum Kina og Noreg er av, áðrenn avgerðin skal takast. Danski uttanríkisráðharrin, Villy Søvndal, var av somu sannføring. - Vit lasa ongar dyr, tvørtur í móti. Vit stuðla ynkinum hjá Kina, um at gerast eygleiðari og vit ynskja at tosa við tey, sum ynskja at sleppa upp í part. Men í løtuni er støðan tann, at Kina ikki ynskir nakað sambandi við Noreg. Vit vóna tó, at hetta fer at broytast, hevur Jonas Gahr Støre sagt við Politiken.